# Behrens í Gøtu á hvítusunnu




*Carl P. Behrens signerar bókina "En flig af nådens trone" eftir gudstænastuna í Gøtu kirkju*

Danski presturin Carl P. Behrens skal prædika í Gøtu kirkju hvítusunnudag 31. mai. Aftaná gudstænastuna signerar hann nýggju bók sína "En flig af nådens trone", sum júst nú er útkomin.

Í bókini er skrivað nakað um Føroyar. Carl P. Behrens hevur verið fleiri ferðir í Føroyum, fyrstu ferð í 1972, tá hann saman við øðrum umboðaði Danmark á ársfundi hjá Heimamissiónini í Føroyum. Hann hevur gjøgnum árini knýtt nógv vinarbond í Føroyum.

Carl P. Behrens var prestur í Ringsted frá 1968 til 1976, og síðan í Nakskov til hann varð pensioneraður í 2004.

*-red*

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

# Frits Johannesen í Focus




*Frits Johannesen hevur listaframsýning í Galerie Focus frá 29. mai til 11. juni.*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Listaframsýning frá 29. mai til 11. juni**

Lendingin í Svínoy er ímyndin av fólki, sum koma og fara.

Hin síðsti tónleikarin fer úr Svínoy, hann hevur spælt ta síðstu konsertina. Nú er tað portrið inn í heim og út í heim, sum hann fer ígjøgnum. Málningurin letur upp hugtøk, sum í tínum og mínum sinni tulka okkara áskoðan um at síggja, hoyra, men trist er tað, tá síðsta fólkið fer av einum stað, har lendingin og bygdaliðið hava verið staðið, har fólk komu og fóru. Portrið út í heim og inn í heim... Eisini inn í listamansins hugaverð fara skap, litir og skaldsligar framstillingar í tónleikarum, næmingum og bygdamanninum, sum er á veg á Muntra ella maðurin uppi á Manni, sum er staðið har tú sært yvir Norðoyggjar og út í tann víða heim, men bygdina Fuglafjørð sært tú niðast við til høgru. Her er vøggan, har er heimið, har er fólkið, har eru tónleikararnir og har býr Frits.



# Heilsuhjálparafelag Føroya 30 ár

Í sambandi við 30 ára stovningardagin hjá Heilsuhjálparafelag Føroya tann 26 mai, var opið hús í hølum felagsins í Fr. Petersensgøtu í Havn týsdagin.

Heilsuhjálparafelag Føroya er eitt felag fyri heimahjálparar, heilsuhjálparar og stuðlar. Endamál felagsins er m.a. at virka fyri fakligu áhugamálum limanna, fyri menning og samanhaldi í felagnum og fyri at lønar- og starvsviðurskifti limanna eru trygg og góð. Í nevndini hjá Heilsuhjálparafelagnum eru sjey limir umframt tiltakslimir.

Í samband við ársaðalfundin hjá felagnum 18. apríl á Hotel Føroyum, var skipað fyri veitslu fyri limum og innboðnum, umleið 160 fólk vóru við til veitsluna, sum var sera væl eydnað.

*-red*



*Nevndin í Heilsuhjálparafelag Føroya, f.v.: Hanna West, Hvalba, kassameistari, Gurli Svartá, Saksun, næstforkvinna, Marjun Jensen, Tórshavn, nevndarlimur, Malan Ò. Olsen, Norðragøta, skrivari, Àsa Holm, Porkeri, forkvinna, Joan Eileen Jóanesardóttir, Strendur, nevndarlimur, Hanna Sørensen, Húsavík, eykalimur, og Jacobina Niclassen, Hvannasund, nevndarlimur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*